# Vil hava øll fakfeløgini at semjast um lønarsteðg

**– Skal avtala gerast ímillum fakfeløgini og landsstýrið um lønarsteðg, mugu øll tey 40 fakfeløgini á arbeiðsmarknaðinum verða við, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum**

TRÝPARTA-SAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*–Tað ber ikki til at gera avtalur við nøkur fakfeløg, sum onnur kanska ikki góðtaka. Tí mugu øllfakfeløgini fyrst finna eina semju, sigur Bárður Nielsen*

– Eg taki fult undir við tankanum. Men ein fortreyt má vera, at øll fakfeløgini semjast fyrst.

Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, tekur fult undir við tankanum um at fara undir samráðingar ímillum fakfeløgini, arbeiðsgevarar og landsstýrið um kostnaðarstøðið í Føroyum.

Tað var eftir seinastu samráðingar, at formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag skeyt upp at fakfeløg og arbeiðsgevarar skuldu fara undir felags samráðingar við landsstýrið í eini roynd at lække kostnaðarstøðið í Føroyum.

Arbeiðsgevarar hava dúgliga ført fram, at kostnaðarstøðið í Føroyum er so høgt, at tað er ein álvarsligur trupulleiki fyri kappingarførið hjá vinnuni.

Ein stórur partur av hesum kostnaðarstøðinum eru lønirnar. Og endamálið við í ímillum fakfeløgini og arbeiðsgevarar øðrumegin og landsstýrið hinumegin, skuldi júst vera, at fakfeløgini bundu seg til at halda aftur við lønarkrøvunum og kanska enntá seta lønarsteðg í verk.

Men afturfyri skuldi landsstýrið so binda seg til at lække skattir og avgjøld, so at keypiorkan kundi veksa, hóast lønin stóð í stað.

Arbeiðarafeløgini og Arbeiðsgevarafelagið hava havt ein fund um málið fyrr í summar og ætlanin var at hittast aftur á fundi nú eftir summarfrítíðina.

À tí fundinum skuldi feløgini finna útav, um tað bar til at semjast um eitt felags útspæl til landsstýrið.

## Øll mugu semjast

Bárður Nielsen heldur ikki, at tað er nóg mikið, at tað bara eru arbeiðarafeløgini og Arbeiðsgevarafelagið, sum semjast um hetta.

– Skulu vit koma nakran veg á hasum økinum, verður tað neyðugt, at øll fakfeløgini í landinum taka undir við ætlanini.

– Og tað verður eisini neyðugt at øll fakfeløgini semjast um eitt felags útspæl til landsstýrið um lønarafturhald afturfyri skatta- og avgjaldslækkingar. Sostatt mugu tey velja eina felags samráðingarnevnd at samráðast við landsstýrið.

Tilsamans eru eini 40 fakfeløg í Føroyum á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum og landsstýrismaðurin vil altso hava, at tey øll at semjast um lønarafturhald afturfyri skatta- og avgjaldslækking, áðrenn slíkar samráðingar kunnu vera við Landsstýrið.

– Tað verður neyðugt at skipa allan arbeiðsmarknaðin í ein samlaðan bólk, sum landsstýrið kann samráðast við.

– Tað haldi eg er ein fortreyt fyri at fara undir trýpartasamráðingar, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Hann heldur, at skal Landsstýrið samráðast við fleiri bólkar ar fakfeløgum um lønarafturhald, kann tað skjótt enda í einum ruðuleika.

– Í mai mánaða skal sáttmáli gerast ímillum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnar. Lat okkum siga, at tað endar við eini semju um lønarafturhald afturfyri skattalætta og avgjaldslækking.

– Spurningurin er so, hvat fer at henda í oktober, tá ið landsstýrið skal samráðast við øll fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum, eitt nú Starvsmannafelagið, sum er nógv tað største felagið.

– Hvat hendir um fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum ikki góðtaka semjuna við arbeiðarafeløgini? Hendir tað, fær landsstýrið ein veldugan trupulleika.

– Tað ber ikki til at gera serliga avtalu um skattalætta við arbeiðarafeløgini. Tí má ein avtala fevna um øll fakfeløgini, annars fara veldugir trupulleikar at taka seg upp, sigur Bárður Nielsen.

Hann leggur afturat, at hevði tað borið til at savna allan arbeiðsmarknaðin um eina slíka semju, hevði hann avgjørt verið sinnaður til at tosa um at lække skattir og avgjøld, treytað av, at fakfeløgini afturfyri bundu seg til at halda aftur við lønarkrøvunum.

# Fara til gongu úr Porkeri til Hovs

**Leygardagin skipar ferðavinnaní Suðuroy fyri einum løttum gongutúri**



*Seinasta leygardag var gingið ú Sumba og niðan á Hestin. Veðrið var av tí allar besta. Nógvir útlendingar vóru við á túrinum. Á myndini sæst ein hugtikin avstraliari við útsýni við Beinisvørð*

Leygardagin skipar ferðavinnan í Suðuroy fyri gonguferð úr Porkeri til Hovs.

Bussur koyrir av kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.00 og av kunningarstovuni í gamla Skúla í Vági 10.30.

Báðir bussarnir koyra til Porkeris, haðani verður farið til gongu niðan ígjøgnum Skálan, upp á Hamar og vestur um Kambin. Síðani yvirum Hálsin, oman gjøgnum Vágaskarð og omaneftir Heiðunum. Nú koma vit til Klivarstein og oman móti Hósmannaklettum fara so framvið Sarknagili og eftir heygunum niðan í bygdina í Hovi.

Túrurin er léttur at ganga og staðkend heimildarfólk eru við á túrinum, har greitt verður frá ymsum á leiðini. Eftir loknan gongutúr verður koyrt við bussi úr Hovi til ávikavist Kunningarstovurnar í Vági og á Tvøroyri.

Gongutúrurin og busskoyring kosta 100 krónur, men hjá børnum er tað ókeypis.

Bindandi tilmelding til túrin skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/ 284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/ 284480 í seinasta lagi fríggjadagin 16.00.

Kunningarstovan heitir á fólk um at hava heit og góð klæði við, góðar skógvar ella styvlar, matpakka og ein drekkamunn.

– Hevur tú kikara og eitt kort yvir økið har gingið verður við tær, gerst túrurin óivað meiri áhugaverdur.

## Fýra túrar eftir

Ferðavinnan í Suðuroy hevur skipað fyri gongutúrum hvønn leygardag í alt summar. Og nú eru fýra túrar eftir.

Komandi leygardag verður gingið Porkeri - Hov, 4. september verður farið av av Hestinum til Kasparsholu og oman í Akraberg, 11. september verður farið úr Hvalba til Sandvíkar, og seinasti túrurin í ár er 18. september og hann verður úr Øravík til Vágs.

Gongutúrarnir í ár hava verðið stak væl umtóktir. Ætlanin er at gongutúrar verða fyriskipaðir aftur komandi summar hvønn leygardag.



# Herverk á havnunum

**Seinastu tíðina hevur herverk verið framt á nógvar bátar, ið liggja í Vágsbotni og á Argjum. Svend Erik Dølum, bátaeigari, sigur, at bert innanfyri seinasta mánaðin, hevur onkur gjørt seg inn á glastrevjabát hansara ikki færri enn tríggjar ferðir. Nú hevur hann verið noyddur at taka bátin upp til umvælingar, orsakað av herverki**

HERVERK

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin*



*Stuttleikabáturin hjá Svend Erik Dølum er nú tikin upp á land, eftir at hava verið útsettur fyri herverk ikki færri enn tríggjar ferðir*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Svend Erik Dølum hevur havt sín skjóttgangandi stuttleikabát í umleið eitt hálvt ár. Báturin hevur ligið í Danmark, men herfyri valdi Svend Erik at taka bátin heim til Føroya. Tað skuldi hann ikki havt gjørt, tí báturin hevur í seinastuni at kalla ikki fingið frið fyri herverki, og nú er hann tikin upp til umvælingar. Eina tíð lá hann í Vágsbotni, men seinastu tíðina hevur hann ligið á Argjum.

– Herverkið byrjaði fyri einum knøppum mánaði síðan. Báturin lá á Argjum, og eg helt, at hann fór at kunna liggja í friði. Hann hevur ligið í Danmark, uttan at nakað er hent, so eg gekk út frá, at hann fór at fáa frið í Føroyum eisini, greiðir Svend Erik frá.

Men tá Svend Erik ein dagin kom oman í bátin varnaðist hann skjótt, at alt ikki var, sum tað átti at vera. Onkur hevði verið umborð og rótað runt í bátinum. Alt var endavent. Ein av hátalarunum, sum hoyrdi til tónleikaanleggið umborð, var eisini ryktur leysur og tikin.

– Fyrstu ferð, at viðkomandi persónar vóru umborð, tóku teir bert ein hátalara. Men teir høvdu rótað runt í øllum bátinum, greiðir Svend Erik frá.

Hann harmaðist sjálvsagt um herverkið, men tá visti hann ikki, at hetta bert var lítið av miklum.

## Herverks klikur

Eina góða viku seinni var nevniliga aftur galið. Hesuferð høvdu fortreðgerarirnir ikki noyðst við at órudda, men høvdu nú eisini stolið anleggið og restina av hátalarunum. Eisini høvdu teir brotið okkurt umborð. Nú var nóg mikið hjá Svend Erik, so hann meldaði herverkið til løgregluna.

– Tá politiið kom út og hugdi at bátinum, søgdu teir mær, at tað vóru alstórir trupulleikar av ungdómi, sum gekk og gjørdi herverk runt í býnum. Teir søgdu tá, at teir júst høvdu tikið ein unglinga, sum gekk niðri í Vágsbotni, og gjørdi seg inn á bátar har, og at støðan var ring í Vágsbotni, greiðir Svend Erik frá.

Løgreglan segði, at tað allarhelst vóru bandar við unglingum um 15-16 ára aldur, sum gingu runt um næturnar og gjørdu herverk.

Svend Erik tosaði eisini við aðrar bátaeigarar, ið høvdu bát sín á Argjum og fleiri kendu til trupulleikan.

– Eigarin av bátinum, sum lá uttanfyri mín bát, segði, at hansara bátur fyrst hevði ligið yviri í Vágsbotni. Har bleiv báturin stolin av unglingum, sum heilt einfalt sigldu avstað við bátinum. Meðan bátur hansara lá har, bleiv anleggið eisini stolið. So hann valdi at flyta bátin yvir á Argir at liggja. Men nú, tá hann sá, at skilið var tað sama á Argjum sum í Vágsbotni, flutti hann bátin haðani eisini, sigur Svend Erik. Svend Erik tók eisini avgerð um at fara at flyta sín bát.

– Eg tók eg avgerð um, at eg skuldi fara at flyta bátin dagin eftir. Eg tordi ikki at hava hann liggjandi við bryggjuna har longur. Hann lá eisini illa fyri, við allari síðuni at bryggjuni, so hann var léttur at koma umborð á. Seint um kvøldið, um hálvgum tvey tíðina, koyrdi eg oman til bátahylin, bara fyri at kanna um alt var í lagið. Tá var alt sum tað skuldi vera, men eg sá, at har vóru nakrir unglingar, um 15-16 ára aldur, sum gingu og mólu. Ein teirra hevði eina motorcross, sigur Svend Erik.

Hann fór aftur til hús og hugsaði, at tá einki var hent so seint út á náttina, so mundi báturin fara at fáa frið.

## Rútarnir knústir

Men dagin eftir, var báturin ikki at kenna aftur.

– Teir høvdu blakað grót á bátin og knúst rútarnar. Eisini høvdu teir boygt jarnið, sum rútarnir eru festir í og brotið alt møguligt innan í bátinum. Tað vóru glassplintur um allan bátin, og grótið hevið eisini rakt dekkið, so at málingin var farin av í fleiri støðum. Tá tók eg bátin upp beinanvegin, greiðir Svend Erik frá.

Báturin er tryggjaður, men við so grovum herverki, gerst tryggingin munandi dýrari. Hetta verður tí ein dýr søga fyri Svend Erik. Ætlanin var eisini at selja bátin, sum hevur verið lýstur til sølu fleiri ferðir, men nú væntar Svend Erik, at tað verður torført at fáa nakran keypara.

– Tað verður eitt stórt arbeiði, at fáa bátin penan aftur, sigur hann, ógvuliga harmur á málinum.

Hann sigur, at hann aldrin hevur verið úti fyri nøkrum tílíkum, tað hálva árið, sum hann hevur havt bátin í Føroyum, og hann heldur tað vera ógvuliga spell, at ungdómurin ikki kann lata so virðismiklar ognir, sum bátar eru, fáa frið.

– Tað loysir seg so lítið at hava eina bátahavn, um hetta skal vera viðferin, ið bátarnir fáa, meðan teir liggja har, heldur Svend Erik at enda.

Løgreglan um herverk:

## Vaksandi trupulleiki

**Trupulleikin við herverki er avgjørt vaksandi. Og tað er ikki bert bátar, sum ikki fáa frið, men hús, garðar og bilar eru eisini hart rakt, sigur løgreglan í Havn.**

HERVERK

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Løgreglan í Havn sigur, at tað altíð er nakað av herverki á bátar, men at teir ikki hava merkt nakran serligan vøkstur í júst herverki á bátar.

– Tað er javnan, at bátaeigarar melda herverk á bátin, men vit hava ikki merkt nakra herverksrøð á bátar, sum so, sigur løgreglan. – Tað hava verið nakrar fráboðanir í seinastuni, men ikki meiri enn vanligt, vil eg meta.

Løgreglan merkir tó týðuliga, at herverk sum heild er farið at vinda uppá seg. Hildið verður, at tað eru ungdómar, sum ganga í leti um kvøldini og um næturnar, og ikki vita hvat tey skulu gera, sum oyðileggja.

– Tað gongur næstan ikki dagur, har vit ikki fáa onkra fráboðan um herverk. Í samlaðu tølunum vil eg tó meta, at bátarnir hava fingið góðan frið. Bilarnir harafturímóti, eru sera hart raktir. Tað tykist, sum tey ungu stuttleika sær við at ríva spegl og antennur av og at skøva bilarnar. Vit hava tó ikki sett nakran stóran offensiv inn ímóti herverki, tí møguleikin fyri at fanga tey seku, er so ógvuliga lítil, sigur løgreglan.

Av tí, at tey fyri tað allar mesta gera herverk um næturnar, er møguleikin nærum eingin at finna tey, tá ið meldað verður dagin eftir. Tá eru tey jú langt síðani farin.

Løgreglan ásannar, at tað sjálvsagt er sera harmiligt, og at tað kostar nógv hjá teimum, ið verða rakt.

– Fólk eru sjálvsagt altíð meiri enn vælkomin at seta seg í samband við okkum, og vit gera tað, vit kunna. Men tey skulu vita, at lítið og einki kann gerast við hetta. Havnin vil so fegin vera sum stórbýirnir, og hetta er í allarhægsta grad eitt stórbýarfenomen. Hetta er heilt einfalt slíkt, sum hendir, er seinasta viðmerkingin frá løgregluni.